Fíggjarmálaráðið

Løgtingið

Dagfesting:	09. februar 2021
Mál nr.:	20/00437
Málsviðgjørt:	JEK
Eftirkannað:	10. november 2020

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatt av reiðarívirksemi (Tonsaskattalógin) (Nágreiningar og konsekvensbroytingar)

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatt av reiðarívirksemi (Tonsaskattalógin)
(Nágreiningar og konsekvensbroytingar)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 51 frá 9. mai 2005 um skatt av reiðarívirksemi, sum broytt við løgtingslóg nr. 122 frá 9. desember 2016 og løgtingslóg nr. 83 frá 7. juni 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 4, stk. 1 og 2 verða orðað soleiðis:

"Skattskyldug inntøka í sambandi við vinnuligt reiðarívirksemi við at flyta ferðafólk og góðs millum ymisk støð verður gjørd upp eftir reglunum í §§ 6-12 fyri:
1) skip hjá reiðarínum, sbr. tó stk. 3,
2) skip sum verða leigað uttan manning, bareboat-charter, og
3) skip, sum verða leigað við manning, time-charter.

Stk. 2. Tað er ein treyt, at skipini eru 100 bruttotons, BT, ella størri, og at tey eru skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni, FAS, ella Føroya Skipaskráseting. Hetta er tó ikki galdandi fyri stutttíðar time-charter í upp til 2 mánaðir."

2. Í § 19, stk. 1 verður "§ 4, stk. 2, 2. pkt." broytt til: "§ 4, stk. 3"

3. Í § 19, stk. 2 verður tvær staðni "§ 4, stk. 2" broytt til: "§ 4, stk. 3".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá og við roknskaparárinum 2019.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Uppskotið verður skrivað lutvíst fyri at ganga ynskjunum hjá vinnulívinum á møti, lutvíst fyri at konsekvensrætta lógina.

Tá tonsaskattalógin varð broytt í fjør við løgtingslóg r. 83 frá 7. juni 2020 skrivaði Reiðarafelagið fyri Handilsskip í hoyringarsvari, at reiðarí kunnu hava tørv á at gera stutttíðar time-charter avtalur, tá skip fara til klassing ella umvæling. Tá so er er neyðugt við orðing, sum letur upp fyri stutttíðar charter, har tað ikki ber til at skráseta seg í FAS. Trupulleikin við verandi orðing er, at tað eru fleiri føroysk reiðarí, sum langtíðar time-chartra skip millum móður- og dótturfeløg. Tá "upp til 2 mánaðir" varð lagt aftrat orðingini í § 4, stk. 1, nr. 3 er avleiðingin, at hesi reiðarí frameftir ikki kunnu langtíðar time-chartra millum feløg í sama samtaki, og framhaldandi vera fevnd av tonsaskattskipanini. Hetta metir felagið verða eina munandi og álvarsliga broyting og møguliga eisini eina misskiljing.

Sambært felagnum var ætlanin ikki, at undantaksreglan um stutttíðar time-charter avtalur skuldi fevna um skip, sum frammanundan eru skrásett í FAS. Talan er heldur um ein ventil til kravið um FAS-skráseting.

1.2. Galdandi lóggáva
Í galdandi lóggávu er ásett, at skip, leigað við manning, time-charter, bert kunnu verða í skipanini í upp til 2 mánaðir.

Tá tonsaskattalógin varð broytt í fjør skrivaði Reiðarafelagið fyri Handilsskip í hoyringarsvari, at reiðarí kunnu hava tørv á at gera stutttíðar time-charter avtalur, tá skip fara til klassing ella umvæling. Tá so er er neyðugt við orðing, sum letur upp fyri stutttíðar charter, har tað ikki ber til at skráseta seg í FAS. Trupulleikin við verandi orðing er, at tað eru fleiri føroysk reiðarí, sum langtíðar time-chartra skip millum móður- og dótturfeløg. Tá "upp til 2 mánaðir" varð lagt aftrat orðingini í § 4, stk. 1, nr. 3 er avleiðingin, at hesi reiðarí frameftir ikki kunnu langtíðar time-chartra millum feløg í sama samtaki, og framhaldandi verða fevnd av tonsaskattskipanini. Hetta metir felagið vera eina munandi og álvarsliga broyting og møguliga eisini eina misskiljing.

Sambært felagnum var ætlanin ikki, at undantaksreglan um stutttíðar time-charter avtalur skuldi fevna um skip, sum frammanundan eru skrásett í FAS. Talan er heldur um ein ventil til kravið um FAS-skráseting.

§ 19 vísir til § 4 stk. 2 í staðin fyri § 4, stk. 3. Talan er her um eina konsekvensbroyting.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er lutvíst at nágreina, hvør kann koma undir tonsaskattalógina, lutvíst at konsekvensrætta ásetingina um grannskoðaraváttan.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við uppskotinum verða tvær broytingar gjørdar.

1) Ásetingin um time-chartar verður nágreinað.
2) Ásetingin um grannskoðaraváttan verður konsekvensrættað.

Fyrra broytingin snýr seg um at nágreina, at tað bert eru time-chartraði skip, sum ikki eru skrásett í eini føroyskari skipan, sum einans kunnu verða í skipanini í upp til 2 mánaðir.

Seinna broytingin er ein rætting, har tilvísingin í § 19 til § 4, stk. 2 verður broytt til § 4, stk. 3.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Sjóvinnustýrinum, TAKS og Vinnuhúsinum.

Harumframt hevur uppskotið ligið alment frammi á hoyringarportalinum hjá Føroya Landsstýri.

Hoyringarsvar er komið frá Vinnuhúsinum og Reiðarafelagnum fyri Handilsskip.

Reiðarafelagið fyri Handilsskip tekur undir við broytingaruppskotinum, sum felagið metir er neyðugt fyri at tryggja, at tonsaskattalógin virkar sum ætlað í sambandi við time-charter.

Reiðarafelagið fyri Handilsskip fegnast um, at henda rætting verður framd beinanvegin.

Felagið metir tó, at tað er umráðandi, at broytingin fær gildi frá og við roknskaparárinum 2019, eins og uppskotið um broyting av tonsaskattalógini, sum varð samtykt í fjør.

Fíggjarmálaráðið tekur hoyringarsvarið til eftirtektar, og hevur broytt uppskotið samsvarandi.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki stórvegis fíggjarligar avleiðingar fyri landið.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri vinnuna, eftirsum uppskotið loyvir, at langtíðar time-chartraði skip, sum eru skrásett í føroyskari skipaskrá, eisini kunnu nýta tonsaskattalógina.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingarnar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið samsvarar við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, sum eru viðkomandi fyri lógaruppskotið.

2.9. Markaforðingar
Tað eru ikki kendar markaforðingar á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og ger heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið áleggur ikki nýggjar skattir, men nágreinar hvørjar inntøkur kunnu viðgerast eftir tonsaskattalógini. Uppskotið hevur virknað frá og við roknskaparárinum 2019.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Nr. 1
Talan er um broyting, sum ber í sær, at verandi áseting verður nágreinað/rættað.

Tá tonsaskattalógin varð broytt í fjør skrivaði Reiðarafelagið fyri Handilsskip í hoyringarsvari, at reiðarí kunnu hava tørv á at gera stutttíðar time-charter avtalur, tá skip fara til klassing ella umvæling. Tá so er er neyðugt við orðing, sum letur upp fyri stutttíðar charter, har tað ikki ber til at skráseta seg í FAS. Trupulleikin við verandi orðing er, at tað eru fleiri føroysk reiðarí, sum langtíðar time-chartra skip millum móður- og dótturfeløg. Tá "upp til 2 mánaðir" varð lagt aftrat orðingini í § 4, stk. 1, nr. 3 er avleiðingin, at hesi reiðarí frameftir ikki kunnu langtíðar time-chartra millum feløg í sama samtaki, og framhaldandi verða fevnd av tonsaskattskipanini.

Við uppskotinum verður hetta broytt soleiðis, at undantaksreglan um stutttíðar timetime-charter ikki fevnir um skip, sum frammanundan eru skrásett í FAS.

Nr. 2 og 3
Talan er um fylgibroytingar.

Tá ið tonsaskattalógin varð broytt seinast, áttu tríggjar fylgibroytingar at verið gjørdar í § 19, soleiðis at tilvísingarnar vórðu til § 4, stk. 3 í staðin fyri § 4, stk. 2.

Til § 2
Í § 2 verður skotið upp, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Sambært gildiskomuásetingini hevur uppskotið tó virknað frá og við roknskaparárinum 2019, og er hetta fyri at umganga, at broytingin ella rætttingin skal ávirka uppgerðarháttin hjá reiðaríum fyri roknskaparárið 2019. Víst verður til kapittul 1.1.

Fíggjarmálaráðið, 10. februar 2021

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Reiðarafelagnum fyri Handilsskip